Starvslýsing

Heimatænastan

## Endurlýsing eftir Deildarleiðarum til Heimatænastuna í Suðurstreymoy - øki 1

Heimatænastan í Suðurstreymoy søkir eftir deildarleiðarum.

Heimatænastan í Tórshavn er býtt í 3 økir, Vestur-, Eystur- og Miðøkið. Í hvørjum øki er ein tvørfakligur bólkur av starvsfólki við heilsuhjálparum, heilsurøktarum og sjúkrarøktarfrøðingum. Til hesar tvørfakligu bólkarnar sóknast vit eftir 3 deildarleiðarum.

Deildarleiðarin hevur dagligu leiðsluna av einum tvørfakligum bólki og samstarvar í toymi saman við hinum deildarleiðarunum og deildarleiðaranum fyri sambýlini.

Deildarleiðararnir eru undir leiðslu av økisleiðaranum. Uppgávan verður, saman við starvsfólkunum og leiðslutoyminum at skipa eina samansjóðaða tænastu, har vit við umsorgan stuðla undir virkisførleika og vælveru hjá tí einstaka borgaranum.

**Vit vænta av tær at tú**

- Hevur útbúgving innan heilsurøkt
- Hevur hug og hegni at leiða og fyrisita
- Evnar at samstarva við bæði brúkara, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur telduførleika á brúkarastøði
- Royndir og útbúgving í fyrisiting og leiðslu er ein fyrimunur

**Sum deildarleiðari hevur tú ábyrgdina av**

- Dagligu leiðsluni og fakligu ábyrgdini av veittum tænastum.
- At leiða, stuðla og menna starvsfólki
- At virka verður innan givnar fíggjarkarmar

**Vit kunnu bjóða**

- Eitt dynamiskt og fjølbroytt starv
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvið
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Fakliga og persónliga menning

**Setanartreytir**

Lønar og setanartreytir eru sambært sáttmála við Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Um tú ynskir at vita meira um starvið kann tú venda tær til Ceciliu Vestureið, økisleiðara, ceciliav@naerverk.fo, tlf. 31 72 49 ella 21 72 49

**Umsókn**

Umsóknin skal sendast og stílast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26
100-Tórshavn
Stílað: Gunnleyg Durhuus, leiðari
Viðmerkt: umsókn

**Umsóknarfreist 8. januar 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Meginskrivstovan

## Fíggjarfulltrúi til Meginskrivstovuna

Nærverkið søkir við hesum eftir fíggjarfulltrúa til Meginskrivstovuna at byrja skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu

Nærverkið hevur, umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna av Nærverkinum, fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Samlaða rakstrarjáttanin hjá Nærverkinum er uml. 460 mio. kr. í løtuni og uml. 1400 fólk starvast í Nærverkinum, sum veitir tænastur um alt landið.

**Arbeiðið hjá fíggjarfulltrúanum er í høvuðsheitum:**

- At leggja roknskaparhaldið hjá Nærverkinum tilrættis sambært roknskaparreglum landsins og at menna hetta samsvarandi hesum.
- At hava mánaðarligt eftirlit við rakstrinum hjá Nærverkinum
- At gera mannagongdir og vegleiðingar v.m. og verða við til at seta tær í verk
- At fyriskipa fíggjarlógararbeiðið
- At tryggja eitt so einsháttað og gjøgnumskygt datagrundarlag sum gjørligt
- Árliga at góðkenna roknskapir hjá sjálvsognarstovnum mótvegis leiðaranum
- At lýsa og greina fíggjarstøðurnar, virksemið og tænastustøðið hjá stovnunum
- At fyrireika og fyriskipa fundir
- At vegleiða og ráðgeva leiðarum úti á stovnum og økjum um landið.

**Førleikakrøv**

Vit vænta, at:

- Tú hevur evni at greina og arbeiða við tølum
- Tú dugir væl at samskifta, herundir orða teg bæði í skrift og talu
- Tú hevur eina positiva menniskjafatan
- Tú arbeiðir skipað og hevur hug at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi
- Tú er opin og virkisfúsur
- Tú trívist í einum virknum og til tíðir umskiftandi arbeiðsumhvørvi
- Tú hevur góð samstarvsevni
- Tú hevur eina viðkomandi framhaldsútbúgving og royndir innan fíggjararbeiði
- Tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði og evni at leggja aftrat hesum kunnleika

Starvsroyndir innan almenna fyrisiting er ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

**Lønar- og setanartreytir**

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Nærverkið. Tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur innan stovnin.

Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa hjá Mary J. í Garði, stjóra ella Tórhallu Simonsen, fíggjarfulltrúa á tlf. 360000

**Umsóknir**

Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Stílað:Mary J. í Garði, stjóri
Argjavegur 26
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 22. januar 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Gleðilig jól og gott nýggjár

Ætt, vinum og kenningum verður ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.



Kærar heilsanir

ANNIKA OLSEN VIÐ FAMILJU

Sosialurin

Sun Investments S.L
Húsasøla frá Spanien
www.suninvestmentsl.com
Linda Ros · Tel 0034 646 930 757